# Tarin í Føroyum kann spinnast til tað reina gull



**Eitt felag hevur nú fingið loyvi til eina roynd at ala tara á Funningsfirði, men ætlanin er at fara undir at ala tara í stórum stíli eystanfyri Nólsoynna Úrdráttir úr tara eru dýrir og verða nógv brúktir í ídnaðinum, men ikki minst kann tari umskapast til umhvørvisvinarliga orku og tí kann hetta verða eitt rættiligt gjøgnumbrot í royndunum hjá føroyingum at minka um útlátið av umhvørvisskaðiligum evnum. Um nøkur ár kann talan verða um eitt útflutningsvirði upp á milliardir**

TARAALING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Seinastu árini hava føroyingar tosað nógv um eitt oljuævintýr.

Men kanska er eitt taraævintýr nakað nógv nærri enn eitt oljuævintýr.

Í øllum førum hevur eitt føroyskt felag nú fingið endaligt loyvi at fara undir eina roynd at ala tara á Funningsfirði.

Eydnast tann royndin, er ætlanin at fara undir rættiliga taraaling í stórum stíli á einum stórum øki eystan fyri Nólsoy.

Tað er felagið Ocean Rainforest, sum nú hevur fingið loyvi at fara undir eina roynd at ala tara á Funningsfirði.

Gilli Trónd, sum er stjóri í Ocean Rainforest, sigur, at ætlanin er at seta tvær installatiónir út í Funningsfirði.

Onnur installatiónin er at ala brúnan tara og hepnast tað væl, er ætlanin seinni eisini at ala reyðan tara.

- Felags fyri hesi bæði tarasløgini er, at tey eru longu í Føroyum frammanundan og sostatt er ikki neyðugt at innflyta nýggj sløg, sigur Gilli Trónd.

## Stóra vælvild

Økið, sum tarin skal alast á, er ein partur av aliøkinum hjá Viking Seafood, men tey hava onki ímóti, at hendan royndin at ala tara, verður á teirra øki eisini.

- Á Viking Seafood hava tey verið ógvuliga beinasom ímóti okkum og tað eru vit takksom fyri, sigur Gilli Trónd.

Hann sigur, at myndugleikarnir javntseta taraaling við laksaaling.

- Tað er óskiljandi fyri lívfrøðingar, men tað var so atvoldin til, at vit kundu ikki fáa nakað øki at ala tara á, uttan at vit fingu samband við ein alara, sum var her frammanundan.

- Í hesum sambandi hava tey á Viking Seafood víst okkum stóra vælvild.

Eftir loyvinum frá myndugleikunum kunnu tey ikki seta tara út fyrrenn 1. mars næsta ár. Tað er tí, at økið skal liggja brakk til tá. Royndarloyvið gongur eisini út 1, januar í 2011, tí tá skal tað aftur leggjast brakk.

Men stjórin í Ocean Rainforest heldur, at hetta má byggja á eina misskiljing.

- Aliøki verða løgd brakk fyri at sleppa undan dálking frá laksi. Men ein máti at síla tað dálkingina burtur, er nettupp at ala tara beint við alibrúk. Sostatt hevði alingin av tara hjálpt upp á brakkleggingina. Tað verður brúkt aðrastaðni, men eftir øllum at døma ikki í Føroyum, leggur hann afturat.

Aliútgerðin, sum tey fara at leggja út í Funningsfirði, líkist eini 300 metra langari línu, einar 5-10 metrar undir vatnskorpuni og sum sum verður fest við akkerum.

Tað er Rúni Joensen, verkfrøðingur, sum hevur ment aliútgerðina og Oystein Patursson, serfrøðingur í havaliútgerð hjá Fiskaaling, hevur roynt hana í simulatori. Men tað er Vónin, sum ger útgerðina.



## Seinkað eitt ár

Gilli Trónd sigur, at ætlanin var at fara undir royndina í ár, men tað hevur gingið so seint hjá teimum almennu stovnunum at viðgera umsóknina, at tilsøgnin er ikki komin fyrrenn beint nú.

- Fyrstu ferð vit søktu um royndarloyvi at tala tara, var í apríl. Vit søktu aftur í mai og í juni og seinasta umsóknin varð send í august.

Gilli Trónd heldur, sostatt var tað ein rættiliga tvørlig mannagongd at fáa loyvi, hóast talan er um eina nýskapandi roynd, sum kann minka munandi um